## Claus Jensen aftur í Lyngby

Claus Jensen, sum seinnu árini hevur spælt yrkisfótbólt í Onglandi, venur nú aftur í Lyngby, har hann spældi sum ungdómsspælari. Claus Jensen hevur ongan sáttmála í løtuni, og hann leitar eftir nýggjum felagi. Fyri fyrst venur Claus Jensen í Lyngby, og so roynir hann at taka støðu til, hvar hann skal spæla næstu tíðina. Tað er upp á tal, at Claus Jensen skal hjálpa Lyngby í superliguni í heyst.



## Lyngby vil bert hava yrkisspælara

Danska felagið Lyngby er aftur í superliguni. Føroysku landsliðsspælararnir Christian Lamhauge Holst og Tem Hansen eru at finna í hópinum hjá Lyngby, og teir skulu saman við restini av hópinum verða yrkisspælarar í komandi kappingarári. Málmaðurin Stefan Camagnolo og verjuspælarin Morten Juul Hansen hava arbeiði við síðuna av fótbóltinum, men teir verða noyddir at sleppa tí, um teir framhaldandi skulu spæla fyri Lyngby.

# Räikkönen bestur á Silverstone

**Lewis Hamilton megnaði ikki at vinna á heimabreytini í Onglandi, men mátti síggja seg yvirhálaðan av finska Kimi Räikkönen**

FORMIL 1
*Pætur Albinus*
*patur@sosialurin.fo*

Stórar vónir vórðu undan kappkoyringini settar til Lewis Hamilton, sum hesaferð skuldi koyra fyri heimaáskoðarunum á Silverstone í Onglandi.

Hamilton byrjaði eisini fremstur, og somuleiðis var tað hann, ið kom fyrstur út á fyrstu rundu. Men seinni í kappkoyringini streyk Räikkönen framvið honum, og helt hann fyrsta plássið allan vegin á mál.

Hamilton hevði m.a. trupulleikar í pittinum, og hetta kostaði honum eisini 2. plássið, sum liðfelagið hansara, Fernando Alonso, vann. Eitt triðja pláss má sigast at vera skuffandi fyri Hamilton, serliga tí fleiri túsund fólk frá øllum Bretlandi vóru savnað saman. Viðhaldsfólkini hjá Hamilton kunnu tó framvegis fegnast um, at Hamilton er klárt á odda í samlaðu støðuni.

Heimsmeistarin, Fernando Alonso, fekk eina lítla uppreisn við at koma næstur á mál, men samanumtikið hevur hetta kappingarárið ikki verið tað besta hjá honum.

Liðfelagin hjá Räikkönen, brasilski Felipe Massa, mátti vegna trupulleikar við motorinum byrjað í pittinum. Hann kom tó sera væl frá tí, og koyrdi seg á eitt fimta pláss.

Næsta kappkoyring verður evropakappkoyringin, sum verður koyrt á Nürburgring-breytini í Týsklandi.



*Tað varð finski Kimi Räikkönen, sum í reyða Ferrari-bilinum varð fyrstur um málstrikuna á Silverstone*

*Mynd: Polfoto/AP*

## Popczynski møguliga til TB

Sekkjaði HB-venjarin, Krzysztof Popczynski, er í sáttmálasamráðingum við TB. Krzysztof Popczynski er frammanundan væl kendur av suður suðuroyingum, av tí at hann sína fyrstu tíð í Føroyum var venjari í Vági. Verður Krzysztof settur í starv sum venjari hjá TB, gerst hann triði venjari hjá TB í ár. Jan Nielsen varð tíðliga í kappingini koyrdur, meðan venjarasætið hjá Milan Cimburovic nú er í vanda, eftir at 48 ára gamli póllendingurin er ávegis til felagið, sum liggur nummar 5 í 1.deild.

## Úrslitið á Silverstone

| Nr | Koyrari | tíð |
|---|---|---|
| 1 | Kimi Raikkonen | 1.21.43,074 |
| 2 | Fernando Alonso | +2,4 |
| 3 | Lewis Hamilton | +39,3 |
| 4 | Robert Kubica | +53,3 |
| 5 | Feleipe Massa | +54,0 |
| 6 | Nick Heidfeld | +56,3 |
| 7 | Heikki Kovalainen | + 1 umgang |
| 8 | Giancarlo Fisichella | + 1 umgang |
| 9 | Rubens Barrichello | + 1 umgang |
| 10 | Jenson Button | + 1 umgang |
| 11 | David Coulthard | + 1 umgang |
| 12 | Nico Rosberg | + 1 umgang |
| 13 | Alexander Wurz | + 1 umgang |
| 14 | Takuma Sato | + 2 umgangir |
| 15 | Christijan Albers | + 2 umgangir |
| 16 | Vitantonia Liuzzi | + 6 umgangir |

## Støðan fyri koyrarar

| Nr | Koyrari | Lið | Stig |
|---|---|---|---|
| 1 | Lewis Hamilton | McLaren | 70 |
| 2 | Fernando Alonso | McLaren | 58 |
| 3 | Kimi Raikkonen | Ferrari | 52 |
| 4 | Felipe Massa | Ferrari | 51 |
| 5 | Nick Heidfeld | BMW Sauber | 33 |
| 6 | Roberg Kubica | BMW Sauber | 22 |
| 7 | Giancarlo Fisichella | Renault | 17 |
| 8 | Heikki Kovalainen | Renault | 14 |
| 9 | Alexander Wurz | Williams | 8 |
| 10 | Jarno Trulli | Toyota | 7 |
| 11 | Nico Rosberg | Williams | 5 |
| 12 | David Coulthard | Red Bull | 4 |
| 13 | Takuma Sato | Super Aguri | 4 |
| 14 | Mark Webber | Red Bull | 2 |
| 15 | Ralf Schumacher | Toyota | 2 |
| 16 | Jenson Button | Honda | 1 |
| 17 | Sebastian Vettel | BMW Sauber | 1 |

## Støðan fyri lið

| Nr | lið | stig |
|---|---|---|
| 1 | McLaren | 128 |
| 2 | Ferrari | 103 |
| 3 | BMW Sauber | 56 |
| 4 | Renault | 31 |
| 5 | Wililams | 13 |
| 6 | Toyota | 9 |
| 7 | Rec Bull | 6 |
| 8 | Super Aguri | 4 |
| 9 | Honda | 1 |